# Ítróttarblaðið

## Ítróttartoymið á Sosialinum:



Hilmar Jan Hansen
einslistir@email.fo



Uni Holm Johannesen
uni@sosialurin.fo



Tróndur Arge
trondur@sosialurin.fo



Heri Simonsen
heris@sosialurin.fo



Álvur Haraldsen
alvur@sosialurin.fo

## Atli berjist fyri bjargingini

Tað er sera tætt millum liðini beint omanfyri niðurflytingarmarkið í næstbestu donsku fótbóltsdeildini, men seinnapartin sunnudagin gjørdi FC Roskilde hjá Atla Danielsen sítt til at lívbjarga sær. Á heimavølli vann FC Roskilde 2-1 á Thisted, sum undan dystinum hevði tvey stig meira enn liðið hjá Atla Danielsen. Við sigrinum háladi FC Roskilde seg upp á 30 stig, sum røkkur til eitt tíggjunda pláss. Hinvegin eru bara trý stig niður til Kolding FC, sum liggur beint undir markinum, so Atli Danielsen og teir hava á ongan hátt tryggjað sær sætið í deildini enn, nú tríggir dystir eru eftir at leika.

# 15

## stuttligastu sms'ini frá 3. hálvleiki

***Steypafinalan verður á sparkivøllinum í Svínoy í samband við Útoyggjastevnuna***

*Hví skal alt verða í Havn? Lat onkran annan onkuntíð fáa okkurt! Tað er nokk at fara til á Ólavsøku sum er*

*Finalan verður í Klaksvík á Summarfestivalinum – avmarkað atgongd*

*Nú veit eg hví Víkingur bara fekk eitt stig á Argjum. Atli skorar altíð, tá hann spælir ímóti Tórði Thomsen. Ígjár var eingin Tórður í málinum hjá AB*

*Gundadalur er handklæðið hjá teimum grátandi havnarmonnunum, sum tapa steypafinaluna*

*Óansæð hvør kemur í finaluna, so verður tað onkur klaksvíkingur, sum spælir »heima«. Teir sløðast allastaðni í Føroyum*

*Ennigarð brøðurnir eru sum reyðar kýr*

*Av tí, at byrjanin hjá B36 líkist so nógv byrjanini í fjør, so spælir »Deja Vu« til dans í kvøld í B36 húsinum*

*Eg haldi tað skuldi verið sum við Melodi Grand Prix'num. Steypafinalan skuldi verið hjá vinnarunum árið fyri.*

*Eg vil heita á Rás2 um at gera eina innsavnan fyri Havnina, so teir fáa ráð til steypafinaluna í framtíðini*

*Hey NSÍ – give me FIVE*

*Nú fari eg út á Toftir at keypa ís, tað er so heitt í Runavík (19 stig)*

*NSÍ fór uppum, har Ennigarðurin var lægstur*

*Nú eitur tað ikki »Olsen Olsen« meir. Tað eitur »Ennigarð Ennigarð«*

*Vit eru á veg um Skopunarfjørð, og vit merkja botn. Uha B68*



*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Petur Elias nýggjur ÍSF forseti

**ÍSF Ítróttasamband Føroya hevði í gjár aðalfund á Hotel Hafnia, har Petur Elias Petersen varð valdur til forseta**

Eirikur Lindenskov

Eini 50 umboð frá sersambondum og ítróttafeløgum kring landið vóru møtt. Petur Elias Petersen, virkandi ÍSF-forseti, greiddi frá virkseminum hetta farna árið. Millum tættirnar, ið hann tók fram, vóru fíggjarviðurskifti og týdningurin av sjálvboðna arbeiðinum kring landið, rørsluárið og fólkaheilsa, førleikamenning, úrvalsítrótt og altjóða virksemi.

Í samband við altjóða arbeiðið varð bæði nomið við metoyggjaleikirnar í Álandi í fjør, og við nýggja altjóða limaskapin, sum ÍSF hevur vunnið sær í felagsskapinum TAFISA.

Eisini varð nomið við sendirættindi, ítróttarverkløg og doping.

Forsetin takkaði samstundis teimum, ið leggja lunnar undir stóra ítróttarvirksemið í Føroyum, ítróttafólkum og -leiðarum, almennum og kommunalum myndugleikum, stovnum og fyritøkum og fjølmiðlum.

Undir innkomin var staðfesting av lógini hjá nýggja sersambandinum fyri bogaskjóting og broytingar lógunum hjá skjótisambandinum fyri. Tær vóru staðfestar av aðalfundinum.

Síðani varð farið til nevndarval, har nýggjur forseti skuldi veljast. Sølvi Reinert Hansen legði frá sær fyrr í ár, og hevur varaforsetin, Petur Elias Petersen, røkt forsetastarvið fram til aðalfundin. Hann var einasta innkomna uppskotið til forsetasessin, og varð hann einmælt valdur til nýggjan forseta í Ítróttasambandi Føroya.

Petur Ove Petersen var einasta innkomna uppskotið til varalim, og varð hann valdur. Hann tekur samstundis sætið í starvsnevndini sum varaforseti.

Nevndin hevur sostatt hesar limir: Petur Elias Petersen, forseti, Petur Ove Petersen, varaforseti, og Katrin Joensen, skrivari.

Undir ymiskt nýtti fráfarni forsetin, Sølvi Reinert Hansen, høvi at takka fyri tíðarskeiðið í starvsnevnd og stjórn ÍSF.